# ÍTRÓTTUR

SAMBAND
JÁKUP MØRK
JAKUP@SOSIALURIN.FO
TLF. 341800

*- Fyri okkara viðkomandi nyttar ikki at tosa um teir, sum ikki eru tøkir*

*Súni Fríði Barbá, AB*

# AB hevur ongan málverja

**Bæði Magnus E. Poulsen og Danny Rasmussen eru skaddir. Og við stongdum flytingarvindeygað er ikki møguleiki at fáa nýggjan málverja í hópin her og nú**

FÓTBÓLTUR
*Jákup Mørk*
*jakup@sosialurin.fo*



*Saman við varamanni sínum, Danny Rasmussen, er Magnus E. Poulsen í løtuni skaddur*

*Mynd: Álvur Haraldsen*

Botnuppgerð í Formuladeildini er á Argjum mánadagin, tá VB/Sumba kemur á vitjan. Sum stigatalvan sær út, so er ein sigur at kalla lívsneyðugur hjá báðum pørtum, men hjá AB kundu teir væl og virðiliga hugsað sær betri fortreytir.

Støðan er nevnliga tann, at AB ikki hevur málverja tøkan til dystin. Magnus E. Poulsen hevur verið fastur málverji í ár, men hann varð skaddur í fjórðingsfinaluni móti HB í steypakappingini. Talan er um fótliðsskaða, og væntandi er hann úti í einar 2-3 vikur.

Móti EB/Streymi seinast fekk Danny Rasmussen so møguleikan, og tó at AB tapti, so kundi málverjin ikki lastast fyri hetta. Millum annað hevði hann frálíka brotssparksbjarging.

Men heldur ikki Danny er tøkur. Undir dystinum brákaði hann nevnliga handliðið, og tí er hann ikki tøkur komandi seks vikurnar.

- Vit hava verið í samband við FSF fyri at vita, hvørt møguleiki er at gera undantak í regluni um flytingarvindeyga, men hetta sær svart út. Tí mugu vit loysa málið innanhýsis, men tað er greitt, at eitt felag ikki uttan víðari hevur fleiri enn tveir sterkar málverjar í hópinum, sigur Súni Fríði Barbá, hjálparvenjari hjá AB.

- Sjálvandi mugu vit til eina og hvørja tíð virða tær reglur, sum eru. Og fyri okkara viðkomandi nyttar ikki at tosa um teir, sum ikki eru tøkir. Men hetta er eitt upplagt øki, har reglurnar um flyting kundu verið smidligari. Málverjaplássið er somikið serstakt, at tað onkursvegna burdi verið so, at undantøk kundu verðið gjørd júst í hesum, heldur Súni Fríði.

Aðra staðni eru eisini undantaksreglur fyri júst málverjaplássið. Eitt nú fekk Liverpool fyri trimum árum síðani undantaksloyvi ti leigusáttmála, tá teir høvdu tríggjar málverjar á skaðalistanum.

# Barbara vann ferð til Italiu

**17 ára gamla Barbara Tausen í Havn vann í gjár eina fótbóltsferð til Italiu, tá Føroyar og heimsmeistararnir spæla. – Eg havi ikki keypt atgongumerki til dystin á Tórsvølli, men tað er kanska ikki neyðugt, nú eg sleppi til Italiu, sigur fegna Barbara**

VINNARI
*Rólant Waag Dam*
*rolant@sosialurin.fo*

Um tvær vikur fyllir Barbara Tausen 18 ár, men hon hevur helst longu fingið bestu gávuna, hon kundi ynskt sær – eina ferð fyri tvey til Italiu, tá Føroyar og heimsmeistararnir spæla.

Hesa gávu hevur Barbara fingið, tí hon tók lut í kapping í Sosialinum, har henda fótbóltsferð var vinningurin. Millum eina ørgrynnu av innsendum seðlum, var hennara drigin upp úr bunkanum, og Barbara Tausen duldi ikki yvir, at hon var ógvuliga fegin um vinningin.

– Hetta er eitt sindur av einum dreymi, segði Barbara, tá hon var framvið í Miðlahúsinum í gjár.

Barbara spælir sjálv við B36, og fylgir væl við í fótbólti. Tíverri hevur hon verið skadd tey bæði seinastu árini, men sum Barbara sjálv sigur, so er fótbóltsferðin eitt plástur upp á sárið í so máta.

### Sjálvandi vinna Føroyar

Leygardagin 2. juni spæla Føroyar og Italia á Tórsvølli, men Barbara hevur enn ikki gjørt av, um hon skal fara at hyggja tá.

– Eg havi einki atgongumerkið keypt mær enn, men tað er kanska heldur ikki neyðugt at fara á Tórsvøll, tá eg sleppi til Italiu í staðin, flennir Barbara, sum er ógvuliga spent upp á ferðina.

– Eg havi ongantíð verið aðrastaðni enn í Danmark og Noreg, so at sleppa ein sovorðnan túr verður stuttligt, heldur Barbara, ið fer at bjóða sjeikinum við.

Spurd um, hvørjar vónirnar til ein tílíkan dyst eru, svarar Barbara flennandi, at sjálvandi vinna Føroyar.

Dysturin á útivølli móti heimsmeistarunum verður leiktur í november. Tá gongur Barbara í øðrum flokki í Studentaskúlanum í Hoydølum. Tað merkir, at hon má biðja sær frí til ferðina.

– Eg má fáa frí, sigur Barbara, og leggur so avgjørd, men smílandi aftrat, at tað vera so ikki skúlatingini, sum halda henni aftur í at fara.



*– Eg havi ongantíð verið aðrastaðni enn í Danmark og Noreg, so at sleppa ein sovorðnan túr verður stuttligt, sigur Barbara, sum hevur vunnið eina ferð til Italiu*

*Mynd: Birgir Waag Høgnesen*

## Jón Rói á 3+ kl. 17 í dag

Jón Rói Jacobsen spælir í dag kl. 17.00 sera týdningarmiklan dyst móti FC Midtjylland. Dysturin verður vístur á sjónvarpsrásini 3+. Vinnur liðið hjá Jón Róa Jacobsen og Súna Olsen, so endurvinna teir annaðplássið í deildini. Teir liggja í løtuni tvey stig aftanfyri júst FC Midtjylland.

Í Danmark rokna tey við, at Jón Rói Jacobsen byrjar í miðverjuni. Ein avkappingarneytumhansara til júst hetta pláss er Kasper Risgård, sum als ikki er við í hópinum í dag.

– Eg havi ikki spælt so væl sum eg kann í vár, og tí hevur venjarin valt Jón Róa Jacobsen fram um meg, og tað eri eg sjálvandi skuffaður av, men soleiðis er fótbóltur, sigur Kasper Risgård við Tibsblaðið.

Súni Olsen er saman við tveimum øðrum leikarum úti við skaða, og er tí ikki við í kvøld.